tíðindablaðið
Leysasøla: 6,- kr.
65. árg.
sosialurin
frælsi
javnaður
brøðralag
5 ferðir um vikuna
Nr.199. ★ týsdagur 20. oktober 1992

# Gátuført herverk í trotabúgvi

# BERT ADVOKATURIN SKULDI HAVT LYKIL

síða 7

# Skotsk bløð: BRETAR NEYÐTAKA FØROYAR

síða 10




*Tað eru ikki blíð orð skotsk bløð hava um bretar, nú teir hava krøvini í marknaðartrætuni við Føroyar. Rán og neyðtøku verða krøvini samanmett við*

*Herverk fyri 40.-000 kr. er framt í trotabúgvunum eftir LT-studio. M.a er tónahøvdið á masterband maskinuniskalað. Og hendan er sjálvur heilin í einum studio. Politiið hevur enn ikki skuldsett nakran fyri herverkið. Advokaturin var einasti, sum skuldi havt lykil. Fyrrverandi eigarin av LT-studio, Georg Eystan Á sigur, at hevur nakar brotið inn, so má tað vera advokaturin sjálvur*



*Kartni Fornagarð, ein av keyparunum LT-studio her við oyðilagsa masterbandmaskinuni. Mynd: Kalmar*

*Skotskt blað um bretar:*

# Fremja rán og neyðtøku móti føroyingum

Tað eru ikki mjúk orð, sum skotska sunnudagsblaðið "Scotland on Sunday" hevur at bera bretum, nú teir krevja rættin til ein stóran part av tí undirgrund, sum føroyingar higartil hava tikið sum givið er føroysk.

Blaðið samanber krøv breta til ein stóran part av føroysku undirgrundini við nútímans rán og neyðtøku fjalt aftanfyri einum Whitehall gekkaskorti og skrivar, at tað við hesum krøvum er lagt upp til eitt stríð, sum minnir ikki sørt um um toskakríggið við Ísland á sinni.

Blaðmaðurin Euan Ferguson skrivar grein beint undan samráðingunum, sum verða í Havn í morgin um marknaðartrætuna millum Føroyar/Danmark og Bretland.

Hann vísir á, at bert 10 ára aftaná Falklandskreppuna er eitt stríð við at taka seg upp í Norðuratlantshavi, har Bretland er áleyparin. Krøv breta byggja ikki á virðing og frælsi, men rættin til oljuríkidømi.

Skrivað verður um tann týdning økið millum Føroyar og Hetland hevur fingið fyri oljuvinnuna, nú teknologisku framstigini gera tað nógv lættari at fáa hendur á olju í undirgrundini.

Blaðið greiðir síðani frá yvirtøkuni av undirgrundini og endurgevur orðini hjá danska uttanríkisráðharranum herfyri, tá hann langaði harðliga út eftir bretum fyri teirra sera órímuligu krøv til undirgrundina við Føroyar.

Blaðið hevur eisini tosað við bretska uttanríkisráðið. Men har er lítið at frætta. Sagt verður bara, at tað er ikki rætt, at bretar hava kravt rættin til alla undirgrundina heilt upp at føroysku strondini.

Scotland on Sunday hevur eisini tosað við Danny Poulsen, ráðgeva í oljuspurningum. Hann vísir á, at fiskimarkið higartil er góðtikið sum miðlinja og mark og heldur tað vera løgið, tá bretar nú ikki longur við góðtaka hetta.

-Vit duga ikki at skilja, hví fiskimarkið og búskaparliga markið ikki eisini skal vera galdandi fyri olju í undirgrundini sigur hann og leggur aftrat, at tað sýnist sum talan hjá bretum meira er um at leggja øki undir seg heldur enn at virða demokratiið.

## Koma í dag

Bretska samráðingarnevndin kemur til Føroya




*Kortið í skotska blaðnum vísir punkteraðu miðlinjuna, sum føroyingar meta eigur at vera markið milllum londini, og nærri Føroyum síggja vit linjuna, har bretar vilja hava markið.*




*Hetta kortið vísir okkum krøvini hjá Føroyum, Onglandi, Írlandi og Íslandi til stóra økið sunnan fyri. 1. er føroysk-danska kravið, 2. er írska, 3 er bretska og 4 er íslendska. Svarta og gráa økið er har bretska og írska kravið er tað sama sum føroysk-danska kravið.*

Vit BINDA 2
komin í handlarnar!




*Nyggja bindibókin "Vit Binda 2" er komin í handlarnar. Og eingin ivi er í, at tú finnur fleiri spennandi jólagávuhugskot til børnini í bókini. Bindibókin hevur hesaferð heilar 17 uppskriftir til barnatroyggjur. "Vit Binda 2" fæst í øllum tógvbúðunum, bókabúðunum og í øðrum handlum, og kostar 59,95.*

*Framsýning av troyggjunum verður á torginum í SMS alla hesa vikuna.*

*Forlagið Binda*